# Føroysku húsarhaldini væl fyri

Hóast økta lánibyrðu, so eru føroysku húsarhaldini væl fyri samanborið við donsk húsarhald. Hetta sýnir ein greining, sum Landsbankin hevur gjørt. Hóast hagtalsgrundarlagið ikki er tað sterkasta, so gevur tað eina greiða mynd av, at útlánini til húsarhaldini eru økt heilt nógv, síðani nýggju og betraðu lánitilboðini komu á marknaðin fyri góðum ári síðani.
Sammet við eitt nú Danmark, so er støðan hjá føroyska húsarhaldinum tó góð. Roknað sum lutfall av BTÚ, so eru føroyska lánibyrðan væl lægri, samstundis sum innistandandi í peningastovnum er væl hægri, staðfestir Landsbankin. Hinvegin gevur hetta seinasta ikki eina heilt greiða mynd, tí í Danmark er siðvenjan við at plasera uppsparing aðra staðni enn í peningastovni rættiliga sterk.




*Sum tað sæst á myndini, so eru útlánini úr peningastovnum vaksin munandi meira enn innlánini seinastu tíðina*

Fiskavirkisvinnan:

# Tá fólk fella frá er eingin at taka eftir



**– Skulu vit framhaldandi hava eina fiskavirkisvinnu í Føroyum, kunnu vit ikki bara standa og hyggja at, meðan fólk fella frá, og eingin tekur eftir. Vit mugu gera nakað - og tað má vera nú, sigur formaðurin í Ráfiskakeyparafelagnum, Andreas F. Hansen**

FISKAVIRKISVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Seinnapartin í gjár var fundur og kjak í Vinnuhúsinum um arbeiðsmegina á føroysku fiskavirkjunum í framtíðini. Fundurin tók støði í frágreiðingini, sum Granskingardepilin fyri økismenning hevur gjørt um hesi viðurskifti.

Tað var Ráfiskakeyparafelagið, sum stóð fyri tiltakinum, og tað var eisini Andreas F. Hansen, formaður í felagnum, sum beyð vælkomin.

Dennis Holm, granskari, legði fram frágreiðingina, sum granskingardepilin hevur gjørt, og síðan hevði stjórin í Føroya Fiskavirking, Meinhard Jacobsen, sínar viðmerkingar.

Eftir viðmerkingarnar hjá Meinhardi, sum umboðaði arbeiðsgevararnar, hevði Vígdis Johannesen, formaður í Havnar Arbeiðskvinnufelag, orðið vegna arbeiðstakararnar.

Síðan var kjak um evnið, og at enda tók Magni Laksáfoss, búskaparfrøðingur og orðstýrari á fundinum saman um.

Sosialurin fer at venda aftur til fundin á vinnusíðunum komandi týsdag.

Í dag hava vit skift orð við formannin í Ráfiskakeyparafelagnum, Andreas F. Hansen, sum er virkisleiðari á virkjunum hjá Sandoy Seafood.

## Meira positivt

Andreas heldur, at trupult er at siga, hvat kemur burtur úr einum slíkum fundi, men hann fegnast um, at bæði Bjørn Kalsø, landsstýrismaður í fiskivinnumálum og Jacob Vestergaard, landsstýrismaður í útlendingamálum, vóru við á fundinum og kundu lýða á, hvussu umboð fyri arbeiðsgevarar og umboð fyri arbeiðstakarar lýsa støðuna.

– Eg haldi, at framløgan hjá formanninum í Havnar Arbeiðskvinnufelag, Vígdis Johannesen, var meira positiv við atliti til útlendska arbeiðsmegi í Føroyum, enn eg havi hoyrt áður frá arbeiðstakarans síðu. Tað haldi eg vera áhugavert, soleiðis sum støðan er – og væntandi verður í fiskavirkisvinnuni í framtíðini.

Andreas sigur, at Jacob Vestergaard eisini hevði orðið á fundinum og greiddi frá, hvørjum landsstýrið arbeiðir við til tess at gera skipanina við útlendskari arbeiðsmegi í Føroyum meira liðiliga.

– Hetta er áhugavert hjá okkum at hoyra – og tað er ikki minni átroðkandi at loysa málið, nú okkum vantar góðar reinskerarar hvønn dag. Úrslitið er, at vit fáa minni og minni fisk ígjøgnum maskinurnar, tí reinskerararnir eru avgerandi fyri, hvussu nógv fer í gjøgnum.

## Eingin tilgongd

Andreas sigur, at høvuðstrupuleikin hjá fiskavirkisvinnuni í Føroyum er hin sami, sum vit síggja í eitt nú Íslandi og Noregi.

– Munurin er bara, at støðan, sum vit hava havt í Føroyum seinastu árini, longu kom til sjóndar í hinum báðum londunum fyri eini 10 árum síðan. Tey tóku avleiðingarnar og fylt upp við útlendskari arbeiðsmegi, sum hevur verið við til at hildið fiskavirkisvinnuni – og øðrum vinnum – í hesum londum uppi.

Hann vísir á, at eingin tilgongd er av fólki til fiskavirkisvinnuna.

– Tá ið royndu fólkini fella frá, kemur eingin í teirra stað og tekur yvir. Tað merkir, at so hvørt, sum fólk eldast í vinnuni og ikki orka at arbeiða meira, minkar talið av reinskerarum, og tað er okkara stóri trupulleiki, sigur Andreas.

Hann vísir til kanningina hjá Granskingardeplinum fyri økismenning, sum greitt sigur, at lítil og eingin tilgongd er til fiskavirkisvinnuna.

– Skulu vit framhaldandi hava eina fiskavirkisvinnu í Føroyum, kunnu vit ikki bara standa og hyggja at, meðan fólk fella frá, og eingin tekur eftir. Vit mugu gera nakað – og tað má vera nú, sigur formaðurin í Ráfiskakeyparafelagnum avgjørdur.

## Gera okkara besta

– Sum arbeiðsgevarar mugu vit gera okkara besta fyri at tey, sum eru í vinnuni, kunnu vera nøgd við umstøðurnar, at tey kenna seg væl og trívast. Arbeiðsumstøðurnar mugu soleiðis verða á høgum støði, og eg haldi, at lýsingin í Sosialinum herfyri av arbeiðsumstøðunum í vinnuni, var sera áhugaverd.

Hann nevnir í hesum sambandi arbeiði, sum eitt nú Tavan í Leirvík ger fyri at fáa fólk at trívast í fiskavirkisvinnuni.

– Men eg stúri fyri, at alt hetta kortini ikki loysir tann trupulleika og veruleika, at tey ungu vilja útbúgva seg. Tí vænti eg ikki, at góðar arbeiðsumstøður sum heild fara at broyta tilgongdina til fiskavirkini, leggur hann aftrat.

Andreas F. Hansen ásannar, at tey ungu als ikki hava hug at arbeiða í fiski, og hetta vísir kanningin hjá granskingardeplinum so týðiliga eisini.

– Tey ungu fáa so nógv "input" allastaðni, bæði um internetið og sjónvarpið, og hetta ávirkar ungdómin til at leita út um landoddarnar og nema sær áhugaverdar útbúgvingar.

## Áhugaverd kanning

Formaðurin í Ráfiskakeyparafelagnum heldur, at kanningin hjá granskingardeplinum er ógvuliga áhugaverd, men hon sigur í stóran mun bara tað, sum virkisleiðslurnar vistu frammanundan.

– Kanningin vísir, at sjógvurin er nógv meira áhugaverdur fyri ungu dreingirnar enn fiskavirkisvinnan, og fyri ungu genturnar hevur fiskavirkisvinnan so gott sum slett ongan áhuga.

Andreas F. Hansen vísir á, at eini 80% av teimum, sum arbeiða í fiskavirkisvinnuni, siga, at tey trívast væl, men kortini hevði helmingurin av teimum tikið av øðrum arbeiði, um annað arbeiði stóð teimum í boði.